

## Neyðugt at økja millumlandasamstarv í Norðurlondum

Árligi fundurin millum norðurlendsku ráðharrarnar í almanna- og heilsumálum hevur nú verið í Íslandi. Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, luttók í kjaki um tær avbjóðingar, sum norðurlendsku vælferðarsamfeløgini standa yvirfyri í sambandi við alheimsgerð, fíggjarkreppu og økta arbeiðsloysið, sigur Almannamálaráðið. Í felags yvirlýsing sláa norðurlendsku ráðharrarnir fast, at neyðugt er at økja um samstarvið landanna millum fyri at lofta hesum avbjóðingum. Nýggi Norðurlendski Vælferðardepilin verður sentralur í økta samstarvinum. Depilin skal eitt nú klekja nýggjar hættir fyri at fáa arbeiðsleys og fólk, sum hava verið sjúkrameldað í longri tíðarskeið, út á arbeiðsmarknaðin aftur. Hóast vit í Føroyum í nógv minni mun hava merkt sviðan av, at samfelagshjólini mæla seinni enn áður, og at arbeiðsloysið enn er sera lágt, kunnu vit fáa stórt gagn av granskingararbeiðinum hjá Vælferðardeplinum, sigur Rósa Samuelsen í tíðindaskrivi. - Ikki minst í sambandi við, at Landsstýrið í heyst fer undir arbeiðið at gera føroyska arbeiðsmarknaðin enn rúmligari, soleiðis at fólk við skerdum førleika í so stóran mun sum gjørligt, kunnu gerast partur av vanliga arbeiðsmarknaðinum, leggur hon afturat.

# Tunlar útsetast og skip framskundast

**Nú samgongan arbeiðir við einum kreppupakka, sum skal fáa okkum ígjøgnum kreppuna so snikkaleys, sum gjørligt, liggur tað eisini í kortunum, at íløguætlanin skal raðfestast av nýggjum**

KREPPUPAKKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Samgongan umhugsar nú at broyta íløguætlanina og at raðfesta nýtt havrannsóknarskip og onnur skip, framum tunlar*
*Savnsmynd*

Tað er ikki vist, at ætlaðu tunlarnar Norður um Fjall og aðrir tunlar, verða gjørdir nú.

Í sambandi við kreppu- og vakstrarpakkan hjá samgonguni, hevur tað eisini ligið í kortunum, at íløguætlanin hjá landsstýrinum skal raðfestast av nýggjum.

Keldur, sum hava verið fundi í fíggjarmálaráðnum, har Jóannes Eidesgaard hevur greitt frá kreppupakkanum, siga fyri Sosialinum, at samgongan umhugsar nú at raðfesta ætlaðu íløgurnar øðrvísi enn hon áður hevur fráboðað.

- Ætlanin er ikki at skerja íløgukarmin, men at raðfesta íløgurnar øðrvísi, so at íløgur í tunlar og annað, verða útsettar.

- Tað, sum liggur í kortunum, er, at íløgupeningur skal flytast frá tunlum, yvir í aðrar verkætlanir.

Ongir ávísir tunlar eru nevndir, men tær tunnilsætlanir, sum liggja fremst fyri at verða gjørdir, eru tunlarnir Norður um Fjall, sum ætlanin er at fara undir næsta ár.

Men ístaðin fyri at gera tunlar, er ætlanin at framskunda arbeiðið at gera nýtt havrannsóknarskip og tað skal smíðast í Føroyum.

Í sama viðfangi er ætlanin at framskunda ætlanina at skifta onkur av teimum gomlu og ótíðarhóskandi strandfaraskipunum, út og kanska eisini at framskunda arbeiðið at umvæla onnur skip.

### Krøv frá Tjóðveldi og fakfeløgum

Tað hevur ljóðað, at hetta er eitt krav, sum Tjóðveldið hevur sett fyri at flokkurin kann taka undir við kreppu-tiltøkunum.

Men tað hevur eisini ljóðað, at tað verður ikki treytaleyst, at almennu fakfeløgini fara at góðtaka, at lønarhækkingin, sum skuldi verða 1. oktober, verður strikað.

Eitt krav sum fakfelagsfólk hava sett fram, er, at peninganýtslan hjá samgonguni verður raðfest av nýggjum og í hesum sambandi hevur tað nettupp verðið nevnt, at tað er tórført at skilja, at vit skulu hava ráð til fleiri tunlar, samstundis sum tað er neyðugt at strika eina avtalaða lønarhækking hjá almennum starvsfólki.

Ein grundgeving fyri at raðfesta skipasmíð framum tunnilsgerður, er, at tað kastar væl meiri arbeiðspláss av sær at byggja skip, enn tað ger at bora tunlar.

Og at raðfesta skipasmíð framum, er serliga við atliti til, at MEST hevur sagt nógvum fólki upp í seinastuni, tí ordrabøkurnar eru tómar og vandi er fyri, at vit fara at missa tann førleikan, vit hava at byggja skip.

# Fiskimannafrádrátturin skerjast 100.000 krónur

**Í kreppupakkanum hjá samgonguni er ætlanin ikki at strika fiskimannafrádrattin heilt, men at skerja hann**

KREPPUPAKKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í sambandi við tey tiltøk, sum samgongan ætlar at seta í verk fyri at minka hallið á fíggjarlógini, hevur mangan verðið ført fram, at eitt av krepputiltøkunum er at strika nógv umrøda fiskimannafráráttin.

Men hetta er ikki heilt rætt, staðfesta vælvitandi keldur, sum hava verið við á fundi í fíggjarmálaráðnum, har Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, hevur greitt frá kreppupakkanum.

Í løtuni fáa fiskimenn ein skattafrían frádrátt upp á 14% fyri inntøkur, upp til 470.000 krónur, áðrenn skatturin verður roknaður.

Fyri inntøkur omanfyri tað, fáa teir ikki frádrátt.

- Tað, sum samgongan nú ætlar, er at skerja fiskimannafrádráttin 100.000 krónur, so at inntøkumarkið kemur niður á 370.000 krónur.

Tað merkir, at ongin skattafríur frádráttur verður fyri inntøkur omanfyri 370.000 krónur.

Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, hevur áður boðað frá í Sosialinum, at verður frádrátturin strikaður, verða skipini løgd við brestin.

Hann er ikki so avgjørdur, tá ið vit spyrja hann um ætlanina at lækka inntøkumarkið.

Sjálvur hevur hann fingið tað fatan, at ætlanin er lækka inntøkumarkið niður á 400.000 krónur.

Enn dugir hann ikki at siga, hvørja støðu Fiskimannafelagið fer at hava til tað.

- Tað er ein spurningur, sum vit fara at viðgera í næstum, so fáa vit at síggja, sigur hann.

Og fyrrenn tann viðgerðin er liðug, hevur hann ongar viðmerkingar.



*Gongst sum ætlað, noyðast nógvir fiskimenn at betala meiri skatt næsta ár, enn teir gera nú*
*Tilvildarlig mynd*